## Tosa aftur um Icesave



Hóast samráðingarnar millum íslendingar, bretar og niðurlendingar um Icesave-skuldina slitnaðu í síðstu viku, hevur samband verið millum íslendingar og bretar síðani fríggjadagin. Íslendska samráðingarnevndin hevur verið í London alla tíðina, og um vikuskiftið hevur hon havt samband við umboð fyri bretsku stjórnina minst tvær ferðir. Fíggjarmálaráðið í Reykjavík segði í gjár, at tað er ikki óhugsandi, at formligar samráðingar kunnu byrja aftur nú beint eftir vikuskiftið. Forsætisráðharrin (myndin) hevur sagt seg vóna at fáa eina betri avtalu innan fólkaatkvøðuna næsta vikuskiftið.

# Vandu á Skálafjørðinum

**Danska skipið Ejnar Mikkelsen og íslendska sjóverjuskipið Ægir høvdu sunnudagin eina venjing, mest í sleipi**

SJÓVERJA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sjóverjurnar, skip, tyrlur og fólk á landi, í londunum í Útnorði hava regluligar venjingar við endamálinum at ger samstarvið betri. Tað ræður um at duga betur at hjálpast at og at vera betur før fyri at hjálpa skipum i havsneyð ella hava tørv á einhvørjari hjálp.

Sunnudagin varð ein minni slík venjing á Skálafjørðinum.

Danska sjóverjuskipið Ejnar Mikkelsen sleipaði írslendska sjóverjuskipið Ægir inn á Skálafjørðin. Tá ið Ægir var komin inn á fjørðin a liggja, legði Ejnar Mikkelsen seg upp á síðuna av Ægir og trýsti hann inn móti bryggjuni í Runavík.

Aftana ta venjingina fóru froskmenn á Ejnari Mikkelsen og Ægir niður ein túr saman.



*Bæði skipini eru útgjørd til at sleipa størri skip*

Síðan fekk Ægir uppgávuna at fáa Ejnar Mikkelsen at bryggja og síðan sleipa hann út av fjørðinum aftur.

Ein slík venjing sum henda hevur stóran týdning.

Tá ið eitt fiskiskip fær trol um skrúvuna, ella motorurin steðgar, skal skipið beinanvegin sleipast til lands. Bæði Ejnar Mikkelsen eru útgjørdar til at kunna sleipa størri skip. Sleipað verður við einum longum sleipitrossa ella veiri, og neyðugt er ofta at sleipa skipið í eina havn fyri at fáa skipið umvælt. Tað ber sjáldan til at sleipa skipið heilt inn at bryggju, og tá ræður um, at sjóverjuskipið leggur seg upp á síðuna av hinum skipini, og síðan trýstir hitt skipið at bryggju.

Sambært Færøernes Kommondo gekk venjingin væl í allar mátar.

## Breyt fingur í bardaga

**Í tveimum førum var politiið hetta vikuskiftið úti og skilti fólk at í bardaga**

HARÐSKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið fór politiið í Havn á gott í einum privathúsi, har tveir menn fóru farnir til hendurs. Annar hevði sligið hin, sum bløddi í vørrini.

Politiið helt tó ikki grundarlag vera fyri nakrari skuldseting í tí førinum.

Men tað var tað, tá ið tveir aðrir menn leygarnáttina fóru at takast inni á einum skeinkistaði í Havn. Annar or á skaðastovuna við brotnum fingri, og hann varð eisini sligin á nøsina.

Maðurin, sum sligin varð, hevur greitt politinum frá, hvat hendi. Hann hevur upplýst, hvør hin maðurin var, men í morgun hevði politiið enn ikki tosað við hann.

# Umsøkjaratalið skramblar niður

**Bara 33 søktu í fjør um at koma inn á føroysku útbúgvingina i sjúkrarøktarfrøði**

ÚTBÚGVING

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í fleiri londum er sannað, at um fá ár verður stórt trot á heilsustarvsfólki við ymiskum útbúgvingum. Í Føroyum er gjørd tann niðurstøða, at heilsuhjálparum verður í hvussu er trot á.

Men tað stendur ikki betur til við sjúkrarøktarfrøðingum.

Einast 33 umsøkjarar vóru til utbúgvingina í fjør, og fyri bert 10 árum síðan var hetta talið 80.

Hetta skrivar Vár í Gong, forkvinna í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í nýggjasta limablaðnum, sum eitur Vøkan.

Vár í Gong heldur tað hava skund at fara at kanna, hvørjum henda afturgongd kemur av.

Í Danmark er gjørt eitt stórt átak fyri at fáa fleiri at lesa til sjúkrarøktarfrøðing orskað av hóttandi trotinum. Átakið er skipað sum samtarv millum fleiri ráð og feløg.

- Vit eftirlýsa, at tey sum ráða, síggja henda trupulleika og byrja at gera nakað við hann, skrivar Vár í Gong.



## Koyrdi í skeivari síðu

FERÐSLA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað kundi havt endað heilt galið, tá ið tveir bilar møttust í Norðoyatunlinum um middagsleitið leygardagin.

Bilurin, sum koyrdi móti Leirvík, kom so langt yvir í hina síðuna, at tá bilarnir møttust, tóku speglini í hvørt annað.

Tann bilurin helt leiðina fram, men tá ið maðurin setti bilin frá sær heima í Eysturoynni, stóð politiið fyri honum.

Hann slapp at blása, og tað vísti seg, at maðurin hevði drukkið ríkiligt.